# Viðlíkahald av vindeygum og hurðum

## GÓÐ RØKT LEINGIR UM HALDFØRIÐ Á TÍNUM VINDEYGUM OG HURÐUM

### SMYRJING

Onki er fullkomiliga viðlíkahaldsfrítt. Sama um tíni vindeygu ella hurðar eru av træ, plast ella aluminium, so er gott at hyggja nærri at teimum av og á. Ein góður vani er at smyrja besløg, hongsl, skinnarar, glíðarar/oyruni ovast í hornunum á vindeyganum og annars allar liðiligar lutir minst einaferð ferðir árliga. Tað ger onki, um tú smyrt bæði um heystið og um várið, tí so tryggjar tú tær at vindeygu og hurðar eru klár til føroyska veturin, og eru frískað upp aftur, tá veturin er av.






Vit mæla til at tit brúka okkara ´beslag-spray´ at smyrja liðiligar lutir við. Hetta er fyrsta floks evni frá okkara týska tilfarsveitara. Tú mást ongantíð brúka eitt spray ella olju við sýru ella rustloysara, tí tað upploysir ikki bert rust, men skaðar eisini haldførisviðgerðina á jarnlutum. Nýtir tú skaðilig evnir á vindeyga ella hurð kann tað ávirka títt garanti. Hjá GRANT kanst tú keypa beslag-spray (smyrjioljuna) og serliga sápu til plastvindeygu og plasthurðar.

### REINGERÐING

Tá tú nú ert farin at smyrja, so er tað eitt gott hugskot at hava ein klút og kanska ein lítlan kust við hondina. Turka og busta dust og fínan sand av pakningum og úr karminum.



Hevur tú plastvindeygu, eigur tú eisini at ansa eftir at drenholini í vindeyganum eru opin, soleiðis at vatn ikki stendur í karminum, men kann renna út aftur. Drenholini eiga at hava ein kappa á uttan. Um tú manglar hesar, so eiga vit teir á goymslu, og kunnu senda teir heim til tín.

Tú mást ikki brúka upploysandi evni, so sum actone ella líknandi, til reingerð. Heldur ikki mást tú brúka hvassar lutir, stálull ella sandpappír, hvørki á glasið ella rammuna.

Vindeygu og hurðar, sum standa ábært í mun til sjórok og saltráka krevja meira røkt. Tú mást spula tey oftari fyri at fáa saltið av glasi, rammu, hongslum o.tl. Eisini eiga liðiligir lutir at vera smurdir oftari.

Hevur tú vindeygu við ventilum, so kanst tú vænta at dust og bitlar frá bilosi savnast í filtrum.
Tí eigur tú at taka filtrið út av og á, og gera tað reint.

GRANT – Føroyskt í Føroyum í yvir hálva øld – og framvegis dygdargott handverk!

í Geilini 2 / 385 Vatnsoyrar / (+298) 35 50 00 / grant@grant.fo / www.grant.fo

Dagført 27. okt. 2020